## VIÐVÍKJANDI GJALDI FYRI UPPIHALDIÐ

Um læknin hevur sett kross fyri pkt. 1, verður goldið av tí sjúkrakassa, har sjúklingurin er njótandi limur.

Um læknin hevur sett kross fyri pkt. 2, pkt. 3 ella 4, verður goldið av Almannastovuni.

## VIÐTØKUR
fyri
HVÍLDARHEIMIÐ »NAINA«
Tórshavn

§ 2. Heimið er ætlað kvinnum, sum aftan á sjúku ella av øðrum grundum tørva hvíld fyri at koma fyri seg aftur.

Framíhjárætt hava a) kvinnur, sum útskrivaðar verða frá sjúkrahúsum, b) kvinnur í Føroyum, sum eftir læknaligari meting tørva uppihald á hvíldarheimi.

Um pláss er, kunnu eisini aðrar kvinnur og menn upptakast á heimið samsvarandi treytunum í hesum viðtøkum.

*Tórshavn*, hin 4. november 1983